## Holst brendi brotsspark

Lyngby hevði í gjár vitjan av nýkosnu meistarunum úr AaB. Dysturin var heldur linligur, og einki mál kom í fyrra hálvleiki. Í seinna hálvleiki legði toppskjúttin Jeppe Curth AaB fram um. Lyngby fekk nakað aftaná brotsspark, men tað brendi Christian Lamhauge Holst. AaB avgjørdi síðani dystin við einum máli afturat. Jón Rói Jacobsen var ikki í AaB- hópinum hesaferð.



## So vann Amager aftur

Fremad Amager vann 1-0 í heimadystinum ímóti Holbæk, og harvið fekk liðið gongd á aftur eftir fleiri vánalig úrslit. Rókur Jespersen spældi við frá byrjan, men varð skiftur út miðskeiðis í seinna hálvleiki. Erling Jacobsen kom á vøllin seinastu minuttirnar, og Hans Jørgensen var eykamálmaður. Málið hjá Fremad Amager skoraði Mohammed Abdalas miðskeiðis í seinna hálvleiki.

# Arnbjørn fer til OB

**Komandi vikuna skal Arnbjørn T. Hansen venja við OB**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein tann vandamiklasti maðurin í føroyskum fótbólti skal møguliga spæla í donsku superliguni komandi kappingarár.

Í øllum førum fer Arnbjørn T. Hansen hjá EB/Streymi til Odense í morgin, og fram til fríggjadagin skal hann venja við superliguhópinum hjá felagnum.

Jákup í Stórustovu, sum er umboðsmaður hjá Arnbirni, váttar, at OB hevur bjóðað spælaranum at koma niður.

- Fyri fyrst fer Arnbjørn so niður at hyggja at umstøðunum. Og komandi vikuna skal hann so venja við liðnum. Men meira enn tað sama fái eg ikki sagt í løtuni, sigur Jákup í Stórustovu.

Hóast nógv skaddur, so skoraði Arnbjørn 14 mál í Formula-deildini í fjør. Í ár hevur hann higar til skorið sjey mál í sjey dystum.



### FAKTA um dystin

**VB/Sumba-07 Vestur 1-0 (0-0)**
1-0: Jón Krosslá Poulsen 13.

**NSÍ-TB 1-1 (0-0)**
0-1: Johan Eyvind R. Mouritsen 24.
1-1: Dánial Hansen br 42.

**HB-AB 1-3 (0-2)**
0-1: Kenneth Jacobsen 9.
0-2: Dion Splidt br 28.
1-2: Emil Nolsøe Leifsson 71.
1-3: Kenneth Jacobsen 83.

**KÍ-B68 1-0 (0-0)**
1-0: Jan Joensen 70.

**Víkingur-EB/Streymur** - *mánakvøldið kl. 18*

**Leygardagin 24. mai**
AB-KÍ
TB-HB
07 Vestur-NSÍ
Víkingur-VB/Sumba
EB/Streymur-B68

# Vandin fyri uppflyting økist

**Aftur hesa ferð vóru úrslitini trivalig ábending um, at tað næsta ár verður sunnudags fótbóltur í Suðuroy**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í Vági høvdu teir undan kappingarárinum ikki roknað við, at lokalu spælararnir fóru at megna meiri enn fyrsta stigið í fyrireiking av nýggjum liði, sum kanska kundi gerast til felagslið fyri alla oynna. Síðani hava teir skemtað sær við, at tað kundi sæð út til, at teir eru um at koma sær í vanda fyri uppflyting.

Úrslitini hesa ferð vóru meiri enn bara ábending um henda veruleikan. VB/Sumba vann á heimavølli ímóti 07 Vestur, sum undan vikuskiftinum var næsti kappingarneytin hjá VB/Sumba, og tað úrslitið ber sjálvandi við sær, at VB/Sumba nú er fýra stig frammanfyri vágaliðið.

Einsamalla málið á Vágseiði, har lotið var frískt, skoraði Jón Krosslá Poulsen mest sum av óvart. Hann sendi flatt innfyri úr vinstru, Dan Djurhuus leyp upp um bóltin, sum rullaði í vágamálið. Í 2. hálvleiki royndi 07 Vestur at trýsta, men teir fingu ikki bóltin í málið hjá Bjarna Johansen, sum stóð seg heilt væl.

AB vann týdningarmiklan sigur í Gundadali ímóti HB, og nú hevur unga AB liðið, sum hevur havt tað trupult á útivølli ímóti oddaliðunum báðum, lagt seg undir liðina á 07 Vestur, og tað kann fara at vísa seg at verða so skjótt, at argjamenn fara at verða á uppflytingarplássi.

Tað vóru heilt nógvir møguleikar, og tikið verður til í Gundadali, at úrslitið kundi væl havt verið 10-10! Kenneth Jacobsen legði AB framum við rimmar skoti úr 20 metrum í 9. minutti, og tveir minuttir seinni misnýtti Thomas Hans Rubeksen hjá HB brotsspark. Dion Splidt hjá AB var tryggari, tá ið hann í 28. minutti fekk møguleikan úr ellivu metrum og legði AB framum 2-0.

Í 71. minutti minkaði Emil Nolsøe Leifsson við fínum lobbara um munin til 2-1, og tá ið heimaliðið royndi at leggja trýst á fyri at javna, vóru fleiri møguleikar í báðum endum. Kenneth Jacobsen staðfesti 3-1 AB sigurin, tá ið hann við skoti úr brotsteiginum og umvegis stólpan setti bóltin í HB málið.

Eftir trý umfør uttan úrtøku eydnaðist tað hjá TB at fáa eitt stig burturúr í Runavík, har úrslitið varð 1-1. Johan Eyvind R. Mouritsen legði TB framum miðskeiðis í 1. hálvleiki, tá ið hann varð leysur í høgru og sendi bóltin millum beinini á málverjanum.

Tríggjar minuttir fyri steðgin javnaði NSÍ. Miðvallarin Jann Martin Mortensen varð feldur í brotsteiginum, og Dánial Hansen umsetti trygt úr ellivu metrum.

Tað gongur sum eftir ánni hjá KÍ. Aftur hesa ferð eydnaðist tað at vinna fulla úrtøku, og nú er KÍ komið so mikið langt upp á stigatalvuna, at tað er rættuliga nógv at geva av í kappingini um at sleppa undan niðurflyting.

Næstbesta liðið hjá B68 vitjaði, og eftir tætta uppgerð varð B68 sent til hús við 1-0 tapi. Sigursmálið skoraði veteranurin Jan Joensen. Tað restaðu 20 minuttir, tá ið Jan sendi fríspark beinleiðis í málið aftanfyri Petur Meinhard Magnussen, sum hesa ferð var B68 málverji.

Í kvøld verður síðsti dysturin í hesum umfarinum spældur. Hann verður í Leirvík, har EB/Streymur fer at vitja.